Tala fyri Niclas Hentze

Góði Niclas

Hesin dagur er hettar nokk ein undarligur dagur fyri teg, tí aftaná 24 ár í bygdarráðnum í Sumba, er tín tíð støðga fyri fyrst. Sumbiar kommuna ynskir at takka tær, ein sum hevur givið nógv av sær sjálvum fyri okkara sókn og fyri Suðuroynna. Niclas, tú hevur verið ein fastur stólpi í bygdarráðnum í Sumba í heilar 24 ár – ein ótrúlig tænasta, sum vit øll kunnu vera takksom fyri. Títt eyðkenni hevur nokk verði **SKINSOM FÌGGJARSTÝRING.** Tann fyrsta tíðin hjá tær í kommununal politikkið var nokk avbjóðandi, tí her vóru nokk ikki nógvir pengar at róta við. Ì 2000 var skattainntøkan hjá Sumbiar kommunu 5,6 mill, í 2024 var hon 11,6 mill

Tú stillar nokk upp fyrstu ferð í 1996, fekk 21 stemmur meini eg tað var.

Verður fyrstu ferð valdur inn í 2000 við 24 stemmun

Og setuna aftaná 2005 til 2008 vart tú borgarstjórið.

Tað er ikki bara talan um tíð, men um eitt lív í tænastu fyri onnur. Sum bygdarráðsformaður frá 2005 til 2008 førdi tú kommununa gjøgnum týdningarmiklar avbjóðingar og truplar tíðir. Tú gjørdi tað við nærlagni, klókskapi og kærleika til sóknina.

Harafturat hevur tú umboða Suðuroynna í SEV-stýrinum tvær ferðir.

Í dag eru okur savnað her – ikki bert fyri at síggja aftur á tíni tíð, men fyri at vísa takksemi. Takksemi um, at okur hava havt ein sum teg at vegleiða okkum og taka tørn fyri sóknina, tá tað hevur verið tørvur á tí. Eg kann minnast aftur á serliga tvey ting tú hevur "lært" meg. Ì mínu fyrstu setu 2009 til 2012 var Hildur borgarstjórið, og á nøkrum fundum, var eg kanska í so ótolin, og hevði hug, at taka fleiri ting uppá meg, sum kanska borgarstjórin átta, tá segði tú, borgarstjórin fær løn fyri hasar uppgávurnar, tú skal ikki hava hasar. Eitt annað var, eg var sera nertikin tey fyrstu árini í kommununi, um ein segði nakað negativt um kommununa, so tók eg tað persónligt, sum um tað var sagt til mín, tað var tað jú ikki. Tá segði tú við meg á einum fundi, at um tú skal taka alt sum verður sagt og skriva um Sumbiar kommunu so persónligt, so heldur tú ikki leingið í kommunal pollitikkið.

So, Niclas, okur takka tær fyri alt tað, tú hevur givið. Og hóast 24 ár í bygdarráðnum eru farin, veit eg, at tú framvegis hevur nakað at geva. So hvør, veit 4 ár ganga skjótt 😊

Hjartaliga takk!